Undirvísingarstýrið
+ 298 200 900 / undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, Postsmoga 9, 110 Tórshavn
www.undirvising.fo

Barna- og Útbúgvingarmálaráðið
Smæran
100 Tórshavn

Dagf.: 27. oktober 2023
Máltal: 23/20234-2
Tygara tilvísing:

Undirvísingarstýrið tekur grundleggjandi undir við, at tað verður gjørd ein lóg um Kervi+, ið hevur til endamáls at skipa og tryggja ábygdarfulla handfaring og verju av persónupplýsingum. Tó hevur Undirvísingarstýrið viðmerkingar til lógaruppskotið, ið er lagt til hoyringar tann 10.10.2023.

1) **§1 stk.2 :** "Landsstýrisfólkið **kann** gera nærri reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+, umframt at gera reglur um dátuflutning." (okkara herðing).
   Tá endamálið við uppskotinum er at tryggja at persónupplýsingar eru væl vardir og sum ikki kunnu koma óviðkomandi í hendi, metir UVS, at tað er av stórum týgningi at hesar reglur verða gjørdar. Í grannalondum eru greiðar mannagongdir gjørdar til skúlar í mun til data flutning millum skúlar, sum m.a. tilskila greitt mun á ymiskum slagi av data, meira og minni persónlig data og dømir, soleiðis at skúlar greitt vita, hvussu hetta skal handfarast. Hendan orðing átti tí at verið broytt til at "Landsstýrisfólkið ger nærri reglur..."

2) **§2 stk.1, stk 2 og stk.5** : Ásetingin snýr seg um flutning av upplýsingum. Her er kann tað undra, at tað gevast loyvi til at flyta upplýsingar millum skúlar, meðan stovnar, sum eftir aðrari lóggávu kunnu fáa upplýsingar úr Kervi+, ikki hava fyri neyðini at fáa hetta loyvi. UVS metir, at her átti at verið nágreinað neyvari hvørjar upplýsingar kunnu flytast frítt, og hvørjir upplýsingar krevja samtykki. Hetta kundi hóskandi verið sett í nærri reglur. Undirvísingarstýrið undrast eisini á orðingina "barnsins besta". Givið er, at bæði skúli, myndugleikar og foreldramyndugleiki hava "barnsins besta" í hyggju. Her kundi verið funnin ein orðing, ið ikki er so lødd ella nágreinað, hvat hugsað verður um.

3) **§2 stk. 3:** Her er talan um eina áseting um kærumøguleikar. Her átti at verið umhugsað, um tað ikki var rættast at hetta stk. Varð sett í eina § grein fyri seg.

4) **§3 stk. 3:** "Landsstýrisfólkið **kann** áseta nærri reglur um ábyrgd, uppgávur og eftirlit í sambandi við, at Undirvísingarstýrið viðger persónupplýsingar vegna dátuábyrgdaran, sbrt. stk. 2. (okkara herðing)
   Tá endamálið við uppskotinum er at tryggja at persónupplýsingar eru væl vardir og sum ikki kunnu koma óviðkomandi í hendi, metir UVS at tað er av stórum týdningi at hesar reglur verða gjørdar. Hendan orðing átti at verið broytt til at "Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur..."

Aðrar viðmerkingar:

Undirvísingarstýrið fegnast um at tað verður gjørd lóg um Kervi+, ið staðfestur ábyrgdarbýti, trygd og rætt til brúk. Tó vil Undirvísingarstýrið leggja dent á, at tað somuleiðis er av stórum týdningi at skúlar, stovnar og brúkarar av skipanini annars verða skúlaði og vegleidd í GDPR og datatrygd, so hesi skilja sína ábygd í mun til handfaring av persónsupplýsingum.

Almennir stovnar hava journaliseringskyldu. Hóast Kervi+ ikki er ein skjalføringsskipan, kundi verið hugsandi, at tað var lagt eitt skjalføringkrav um dátuflutning og handfaring.

Annað enn ásetingin um at geva loyvi og kærumøguleika, eru ikki ásetingar um rættindi hjá teim skrásettu. Her kundi kanska verið lagdar greiðari ásetingar inn.

Vinarliga

Undirvísingarstýrið